Álit

í

løgtingsmáli nr. 49/2022: Uppskot til løgtingslóg um lántøku til landskassan fyri 2023

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 14. februar 2023, og eftir 1. viðgerð 21. februar 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 22. februar og 2. mars 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Landsbankan og landsstýrismannin í fíggjarmálum, Ruth Vang.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið snýr seg um at geva landsstýrismanninum heimild at økja um skuld landskassans við í mesta lagi 350 mió. kr. til at rinda fyri møguligt gjaldførishall í 2023.

Orsøkin til uppskotið er, at lógarásetta minstagjaldføri landskassans á 15% av BTÚ frá 1. januar 2023 er hækkað við 350 mió. kr. til 3,4 mia. kr.

Landskassin hevði avlop í 2022, og á fíggjarlógini fyri 2023, sum er til viðgerðar í tinginum í løtuni, er somuleiðis avlop. Framfluttar støðlingar, t.e. óbrúktar løgujáttanir, eru hinvegin stórar. Nøktandi gjaldføri er tí ikki til at fíggja økingina í minsta gjaldførinum, hóast avlop.

Umframt økingina í gjaldføri landskassans á 350 mió. kr., skal eitt lán landskassans á 550 mió. kr. endurfíggjast seinni í ár. Talan verður sostatt um í mesta lagi 900 mió. kr. í lántøku tilsamans; hóast bruttoskuldin við hesum økist, verður nettoskuld landskassans óbroytt.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 27. mars 2023

Eyðgunn Samuelsen formaður	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	